Petur Jacobsen, Rás 2:

KODA luktar av rámum eginháuga

Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2, er ikki ein av teimum heitu talsmonnunum fyri at fáa KODA skipanina at rigga í Føroyum. Hann heldur, at KODA luktar langan veg av egnum áhuga av monnunum, sum taka sær av KODA her í Føroyum. – Besta loysnin er at gera eitt føroyskt felag, har føroysk tónaskøld og tónleikarar kunnu fáa pening frá, sigur Petur Jacobsen

UPPHAVSRÆTTINDI
Ingrid Bjarnastein

Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2, heldur, at KODA skipanin luktar av egnum áhuga her í Føroyum. Hann heldur ikki, at føroyskir tónleikarar fáa nóg mikið burturúr, tí pengarnir fara burtur í umsiting, vit ikki vita nakað um

Savnsmynd

Nógvir heitir talsmenn eru fyri KODA í Føroyum, og tí slepst ikki undan, at onkur er, sum meinar beint tað øvugta. Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2, er ein av teimum, sum heldur, at KODA skipanin er alt annað enn í lagi.

– Talan er um eina rúgvu av peningi, sum fer av landinum, men bara ein brøkpartur kemur aftur til Føroya. KODA luktar langan veg av egnum áhuga, sigur Petur Jacobsen.

– Kristian Blak er ein av heitu talsmonnunum fyri KODA, tí 10% av teimum pengunum, sum fara av landinum koma aftur. Og tað fær felagið Føroysk Tónaskøld at umsita. Men tá eg havi spurt, hvat allir hesir pengarnir verða brúktir til, vilja teir ikki svara mær. Tað stinkar langan veg av egnum áhuga.

Petur Jacobsen sigur seg ikki hava nakað ímóti, at føroysk tónaskøld og tónleikarar fáa pengar.

– Pengar kunnu tey gott fáa. Tað unni eg teimum so væl. Men tað sum mær ikki dámar er, at pengarnir, sum vit skulu gjalda fara av landinum, og síðani verða sendir til Kim Larsen ella Shubidua. Tí soleiðis er tað. Meginparturin av pengunum, sum verða sendir av landinum, enda hjá onkrum útlendskum kunstnarum.

Egið felag

Sjálvur heldur Petur Jacobsen, at tað besta hevði verið, at stovna eitt føroyskt felag. Hann heldur ikki, at tað skuldi verið nakar trupulleiki at bygt upp eitt netverk og fingið tær avtalur í lag, sum skulu fáast í lag.

– Við teldutøknini í dag er tað ikki nakar trupulleiki, sigur Petur Jacobsen.

– Vit kundu til dømis gjørt ein grunn, har útvarpsstøðir, dansistøð og hvat tað nú einaferð skal vera, gjalda til, og hesin grunnur kundi so, til dømis, havt eina avtalu við KODA. Henda avtala kann vera, at eitt ávíst prosenttal av pengunum fara til føroyska tónleikamarknaðin og eitt prosenttal fer til KODA, sum KODA so skal umsita til tann útlendska marknaðin.

Á henda hátt, metir Petur Jacobsen, at pengarnir enda í røttum hondum, og peningurin veruliga kemur til sín rætt. Nevniliga í lummanum hjá tónaskaldinum, har hann eigur at vera.

Útvarpsstjórin metir, at á henda hátt verða pengar eisini spardir, ístaðin fyri at ein stórur partur av peningi fer til umsiting, sum vit als ikki vita nakað um.

Eisini vísir útvarpsstjórin á, at Ísland brúkar ikki KODA, men hevur sítt egna felag.

– Tað optimala hevði tí verið at havt eitt føroyskt felag, har vit vita, hvussu er við umsiting og útbýting av pengunum, so allir pengarnir ikki drukna í umsiting onkra aðrastaðni, sigur Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2 til enda.

Fimm ættarlið

Olivia Petersen úr Skopun kann veruliga siga, at hon hevur eina stóra familju. Hon eigur fimm børn, 24 ommubørn, 41 langommubørn og 14. mars 2002 kundi hon fyri fyrstu ferð kalla seg oldurommu. Elsta langommudóttirin fekk tá sonin Mattias í Nesinum.

Á myndini situr oldurromman undir Mattiasi, mamman Mirjam Jacobsen við síðunar av. Omman, Olivia Kristiansdóttir stendur høgrumegin, og langomman, Sólva Nielsen vinstrumegin.

Vit hava træverju frá Hygæa

Hygæa Acryldæk
er dekkandi træverja
til alt træverk

Hygæa Supra
dekkandi oljubasera
træverja

Hygæa Træoljja
verjir ímóti rot og svamp

Stigar til øll endamál

WIBE - Skjótistigar
5m-6m-7m-8,5m og 10m

WIBE - Universalstigar
kann bæði brúkast sum trappustigi og skjótistigi 3,7m

WIBE - Trappustigar
frá 3-7 trin, kann
leverast upp í 12 trin

VALDEMAR LÜTZEN
Skálatrød • Postboks 20 • 110 Tórshavn • Tel. 31 10 20

Ábyrgdarleyst at geva rentustuðul til øll lán

Norðoyar Sparikassi er ikki av somu áskoðan sum stóru peningastovnarnir, tá teir siga, at rentustuðul eigur at veitast til øll lán, og ikki bara sethúsalán. Uppskotið er beinleiðis ábyrgdarleyst, heldur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa

FÍGGJARVIÐURSKIFTI
Jón Brian Hvidtfeldt

Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa
Mynd: Finnur Justinussen

Norðoya Sparikassi leggur seg nú út í kjakið, sum hevur verið seinastu tíðina, um hvørt lógin um rentustuðul eigur at broytast, so stuðul verður veittur øllum lánum. Eftir at tað kom fram, at Toll&Skatt er farið at kanna fíggjarviðurskiftini hjá útvið 80 sethúsaeigarum, tí illgruni er um, at sethúsalánið, sum tey fáa rentustuðul til, er nýtt til annað enn sethúsini, mæltu báðir teir stóru peningastovnarnir til at broyta lógina. Teir mettu, at rentustuðul eigur at gevast til øll lán, óansað hvat tey skulu nýtast til.

Men hesum er Norðoya Sparikassi hart ímóti. Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, heldur tvørturímóti, at myndugleikarnir eiga at halda fast við verandi skipan, har rentustuðul bara verður givin til sethúsalán, umframt lestrarlán. Verður lógin broytt, fer tað at elva til meirnýtslu. Eyðfinn Reyðberg vísir á, at lógin, sum avmarkar rentustuðulin, júst var ein avleiðing av ovurnýtsluni í áttatiárunum.

Norðoya Sparikassi metir eisini, at verður lógin broytt, so verður rentustuðulin, sum í dag er 42 prosent, so við og við lækkaður á øllum lánum, tí skipanin gerst ov dýr fyri tað almenna. Eyðfinn Reyðberg metir, at mest sannlíkt hevði verið, at rentustuðulin hevði fallið til undir 30 prosent, og tað hevði komið illa við hjá vanliga sethúsaeigaranum.

Stjórin í Norðoya Sparikassa metir, at tað ber til hjá peningastovnunum sjálvum at byrgja upp fyri, at fólk ikki nýta sethúsalánini, t.d. til at gjalda bilin.

- Tá vit ráðgeva okkara viðskiftafólki, so eiga vit at gera tað út frá teimum lógum, sum eru galdandi. Sjálvandi kunnu vit ikki hava eftirlit við hvørjum hundraðkrónuseðli, sum fólk lænir, men tá talan er um størri upphæddir, so ber til at fylgja við, hvat lánið verður nýtt til, sigur Eyðfinn Reyðberg. Hann vísir á, at Norðoya Sparikassi, øll árini síðan lógin um rentustuðul varð broytt í 1991, hevur havt fastar mannagongdir fyri, hvat sethúsa- og lestrarlán kunnu nýtast til, og hevur eisini havt eftirlit við, at mannagongdirnar verða fylgdar.

Norðoya Sparikassi gott úrslit fyrra hálvár

Roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa yvir fyrstu seks mánaðirnar í ár vísir eitt yvirskot uppá 12,2 milliónir krónur áðrenn skatt. Úrslitið er eina millión betur enn fyrra hálvár í fjør.

FÍGGJARVIÐURSKIFTI
Jón Brian Hvidtfeldt

Hálvársroknskapurin, sum leiðslan í Norðoya Sparikassa legði fyri Umboðsráðið á fundi norðuri í Mikladali hóskvøldið, er besti hálvársroknskapur hjá sparikassanum nakrantíð. 12,2 milliónir vóru í yvirskoti áðrenn skatt, og egin-peningurin í Norðoya Sparikassa er nú 213 milliónir krónur.

Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, er væl nøgdur við úrslitið og væntar eisini, at samlaða úrslitið í ár verður betur enn í fjør. Í fjør hevði Norðoya Sparikassi 24 milliónir krónur í yvirskoti áðrenn skatt.

Hóast samlaði roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa javnvigar við eini góðari milliard, so liggur tað ikki fremst í huganum hjá sparikassastjóranum at Norðoya Sparikassi skal vera sjónligur aðrastaðni í landinum, t.d. við at stovna deild í høvuðsstaðnum.

- Ein partur av okkara styrki er, at vit eru sjónligir í lokalsamfelagnum í Norðoyggjum. Vit merkja, at fólk stendur saman um Norðoya Sparikassa, og tað er eisini okkara samleiki, identitetur, sum peningastovnur, sigur Eyðfinn Reyðberg. Hann leggur afturat, at skuldi Norðoya Sparikassi viðkað um sítt landfrøðiliga øki, so er meira sannlíkt, at tey høvdu stovnað eina deild afturat í Eysturoynni, heldur enn í høvuðsstaðnum.

Sethúsalánini mynda umleið helmingin av útlánunum hjá Norðoya Sparikassa, og samanlagt eru umleið tveir triðingar av útlánunum til privat, meðan ein triðingur eru útlán til vinnuna. At sethúsalánini, serliga við 1.veðrætti, fevna um so stóran part av útlánunum er við til at skapa stabilitet, sigur Eyðfinn Reyðberg, men leggur afturat, at tey heldur ikki geva so stóran vinning til peningastovnin. Norðoya Sparikassi fer tó framvegis at leggja dent á at privatu lánini skulu vera størsti parturin av útlánunum, heldur enn vinnulánini, sum tíðum hava størri vága við sær.

Norðoya Sparikassi hevur ongar ætlanir um at umskipa seg til partafelag, hóast Føroya Sparikassi hevur gjørt tað. Norðoya Sparikassi sær í løtuni onga fyrimunir við at umskipa seg, og metir at kunna røkja síni áhugamál við verandi bygnaði. Eyðfinn Reyðberg metir støðuna hjá Norðoya Sparikassa at vera nakað øðrvísi enn hjá Føroya Sparikassa, sum í dag verður rikin sum partafelag.

kk r r kn n
t kur t kk v f tum

www.smyril-line.com

SMYRIL LINE

SMYRIL LINE